## Microbus í 2007



Ætlanir eru frammi um at VW Microbus, sum fyrstu ferð bleiv sýndur fram í Detroit í 2001 sum konseptbilur, verður framleiddur á eini VW verksmiðju í Hannover í 2007

*Kelda: Motor Magasinet*

## Nýggjur diesel til 9-3



Saab 9-3 fær ein nýggjan 1,9 litur dieselmotor frá Opel Vectra CDTi, í staðin fyri tann núverandi 2,2 litur TiD. Nýggi motorurin verður gjørdur í tveimum útgávum við ávikavist 120 og 150 hk

*Kelda: Motor Magasinet*

## 5 stjørnur til Astra



Nýggi Opel Astra fekk 5 stjørnur í EuroNCAP krasjtestunum og mettur sum tryggasti bilurin í klassanum "smáir familjubilar"

*Kelda: Motor Magasinet*

Toyota Corolla:

# Facelift í september 2004

**Kappingin er hørð í sokallaða Golf-klassanum og allir mugu fylgja við í menningini. Toyota Corolla fáa eina "facelift" seinni í ár. Framman kemur bilurin at líkjast nýggja Corolla Verso**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í september 2004 verða Toyota Corolla nakað broyttir. At síggja til er broytingin størst framman við t.d. nýggjum kølaragittari, lyktum og kúfangara.

Innan vera eisini broytingar sum t.d. "Optitron" instrumentir, sum í Lexus og nýggja Corolla Verso.

Trygdin verður eisini betri. ESP, ella VSC sum Toyota nevna skipanina, verður nú standard. Skipanin rættar bilin upp, um hann t.d. glíður út í svingum. Eisini vera aktivar nakkastúttur, antispinn og bremsuassistentur standard.

Frá Toyota verður upplýst, at bilurin verður sera væl ljóðdoyvdur.



*Toyota Corolla kemur at líkjast Corolla Verso framman við t.d. nýggjum kølaragittari, kúfangara og lyktum*

# Audi A3 Sportback við fimm hurðum

**Nakað síðan kom ein heilt nýggjur Audi A3 við trimum hurðum. Nú er so útgavan við fimm hurðum, A3 Sportback, eisini komin á marknaðin. Bilurin fæst við bæði fýra og seks cyl. motorum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nú kom so aftur ein nýggjur Audi á marknaðin. Talan er um A3 Sportback við fimm hurðum og sportsligum designi. Undirvognurin er soleiðis gjørdur, at bilurin hevur sportligar koyrieginleikar og sera góðan stabilitet í svingum.

A3 Sportback hevur elektromekaniskar róðurgreiðir og servostýring, sum tillagar seg ferðina. Bilurin hevur "multilinkbakaksil" og fæst eisini sum 4x4 Quattro í dýraru útgávunum.

Ein heilt nýggjur 2.0T FSI bensinmotorur við turbo og 200 hk er á skránni. Hinir motorarnir eru: Tveir 1,6 litur bensinmotar vi ávikavist 102 og 115 hk, ein 3,2 litur V6 motorur, og tveir 1,9 og 2,0 TDI dieselmotorar. Nakrar av útgávunum hava 6-trins girkassa

A3 Sportback fæst í trimum útgávum hvat útgerð viðvíkur, grundútgávan er Attraction, sportútgávan er Ambition og Ambiente er luksusútgávan.

Av trygdarútgerð kunnu vit nevna t.d. aktivar nakkapútur, airbag framman, í síðunum og høvuðairbag til tey ferðandi framman og aftan. Automatiskt klimaanlegg er standard. Bilurin hevur eisini elektroniska stabilitetsprogrammið (ESP) og bremsuassistent.



*Audi A3 Sportback viðfimm hurðum. Eins og allir nýggir Audi hevur hesin eisini nýggja trapez-formaða kølaragittari*



*A3 Sportback aftan. Viðførisrúmið er 370 litrar og 1.120 litrar við baksetrunum niðri. Útgávurnar við størru motorunum hava dupult útstoyt*



# Eitt brús av sangi, ljóði og tónleiki

VARMAKELDA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á varmakeldustevnu í ár verður munandi meira gjørt burtur úr á listarliga økinum enn vanligt. Umframt fjøltáttaðu listina, verður eisini skipað fyri eini ljóðmynd, sum byrjar úti á fjørðinum, har ein róðrarbátur kemur rógvandi inn eftir vágni við einum marmennli (kópakonu) í skutinum, meðan ljóð og tónleikur ljóða um tann víða fjørð. Saxofonisturin Mikkel Hess situr í bátinum og blæsir upp á saxofon, og Jóhan Hentze spælir upp á trompet.

Ein listabólkur av Falster, sum listamenn í Fuglafirði hava samband við í listaligum ávikum, hava gjørt nakrar standmyndir, sum eru settar upp á ytra armi á bátahylinum.

Tá ið róðrarbáturin kemur at landi, fer kópakonan í land á bátabrúnni, og tá koma fleiri sjónleikarar úr Íslandi, Noregi og Danmark í kópakonuhami uppí leikin. Øll fara nú dansandi inneftir bátabrúnni.

Fuglafjarðar Hornorkestur stendur millum standmyndirnar og spælir, og alt flytir seg nú inn í Mentanarhúsið, har trý kór – Tritonus úr Keypmannahavn, Kór Langholts kirkju úr Reykjavík og Fuglafjarðar Sangkór – fara at syngja eina kantatu, sum Alexandur Kristjansen, skald úr Fuglafirði, hevur skrivað.

Brøðurnir, Mikkel, Nicolaj og Emil Hess úr Danmark, seta tónleikin til kantatuna. Hesir eru heimskendir jasstónleikarar.

Alt endar í einum brúsi av sangi, ljóði og tónleiki.

Mikkel er saxofonistur, Nikolaj pianistur, og Emil Hess er trummusláari. Kontrabassur er eisini við, og her verður tað Edvard Nyholm Debess sum spælir.






*Ein ljóðmynd fer fram úti á fjørðinum í Fuglafirði á varmakeldustevnu í summar. Róðrarbátur kemur rógvandi inneftir vánni við einum marmennli – ella kópakonu - í skutinum, meðan ljóð og tónleikur ljóða um tann víða fjørð. Alt endar í einum brúsi av sangi, ljóði og tónleiki í Mentanarhúsinum*

*Myndakollaga: Dávur Winther*

## Menniskjað í søgn og søgu

### Eitt norðurlendskt tiltak

### Hósdagur 1. juli

Fimleikahøllin kl.16-20
Listaframsýningin "Blandað List".
Ymisk listafólk sýna fram

Kommunuhúskjallarin kl.16-20
Listaframsýningin "Ein ljóðinstallatión" við íslendska listamanninum, Baldvin Ringsted.

Stórhúshøll kl.18-20
Listaframsýningin "Menningartarnað saman við Ogga"
Menningartarnað sýna fram sína list, eisini luttekur Oggi við grafiskum verkum.

Arbeiðsmannafelagshúsið kl.16-20
Danski listabólkurin 7-9-13 sýna fram.
Hetta eru listafólkini, ið hava gjørt nýggju standmyndirnar
Eisini luttaka onnur listafólk

Gamla Toystovan kl.16-20
Listaframsýningin "Ung List"

Gallarí Ribarhús kl.16-20
Keramikkframsýningin "Vanvart".
Listaframsýning við Guðrið Poulsen

### Fríggjadagur 2. juli

Fimleikahøllin kl.16-18
Listaframsýningin "Blandað List"
Ymisk listafólk sýna fram

Kommunuhúskjallarin kl.16-18
Listaframsýningin "Ein ljóðinstalatión"
Við Íslendska listamanninum Baldvin Ringsted

Stórhúshøll kl.16-18
Listaframsýningin "Menningartarna saman við Ogga"

Arbeiðsmannafelagshúsið kl.16-18
Danski listabólkurin 7-9-13 sýna fram

Gamla Toystovan kl.16-18
Listaframsýningin "Ung List"

Gallarí Ribarhús kl.16-18
Keramikkframsýningin "Vanvart"
Listaframsýning við Guðrið Poulsen

Uttanfyri Mentanarhúsið kl. 19:00
Ljóðmyndin "Havljóð"
Og við bátahylin Menniskja í søgn og søgu - Eitt norðurlendskt samtak. Bátur kemur inn eftir vánni, trompet spælari, og saxofonistur spæla umborð á bátinum Dansarar og sjónleikarar koma dansandi inn eftir bátabrúnni Fuglafjarðar hornorkestur spælir og teldutónleikur sum er upptikin úr føroysku náttúruni hoyrist í stórum hátalarum runt í økinum.

Mentanarhúsið kl. 20:15
Kantatan: Songur til Mentanarhúsið - Alexander Kristiansen / Emil og Nikolaj Hess verður sungin av Fuglafjarðar sangkóri, Tritonus og Kór Longholtskirkju. Fylgisspæl jazzkvartet - Hessbrøðrunum og Edv. N Debess

### Leygardagur 3. juli

Fuglafjarðar Kirkja kl. 11:00
Matiné við Klarinettorkestrið undir leiðslu av Peder Riis

Fimleikahøllin kl.14-20
Listaframsýningin "Blandað List"
Ymisk listafólk sýna fram

Fimleikahøllin kl. 14:30
Klarinettorkestur spælir tónleik undir leiðslu av Peder Riis

Kommunuhúskjallarin kl.14-20
Listaframsýningin "Ein ljóðinstalatión" við íslendska listamanninum Baldvin Ringsted

Stórhúshøll kl.14-20
Listaframsýningin "Menningartarnað saman við Ogga"

Arbeiðsmannafelagshúsið kl.14-20
Danski listabólkurin 7-9-13 sýna fram

Gamla Toystovan kl.14-20
Listaframsýningin "Ung List"

Gallarí Ribarhús kl.14-20
Keramikkframsýningin "Vanvart"
Listaframsýning við Guðrið Poulsen

Fuglafjarðar Kirkja kl. 16:00
Kirkjukonsert við Tritonus kórinum, John Højbye stjórnar

### Sunnudagur 4. juli

Fimleikahøllin kl.14-20
Listaframsýningin "Blandað List"
Ymisk listafólk sýna fram

Fimleikahøllin kl. 16:00
Atli Elendersen Violin, og Sune Brogård klaver

Kommunuhúskjallarin kl.14-20
Listaframsýningin "Ein ljóðinstalatión" við íslendska listamanninum Baldvin Ringsted

Stórhúshøll kl.14-20
Listaframsýningin "Menningartarnað saman við Ogga."

Arbeiðsmannafelagshúsið kl.14-20
Danski listabólkurin 7-9-13 sýna fram

Gamla Toystovan kl.14-20
Listaframsýningin "Ung List"

Gallarí Ribarhús kl.14-20
Keramikkframsýningin "Vanvart"
Listaframsýning við Guðrið Poulsen